# Vaktarhald umborð á Logos Hope

OM hevur nú yvirtikið Logos Hope og hevur tí brúk fyri fólki at hava vakt umborð frá komandi sunnudegi og umleið tvær vikur fram.

Í tí sambandi verður ein kunningarfundur um vaktarhald leygardagin 24. apríl kl. 14 umborð á Logos Hope sum framvegis liggur í Nordhavnini.

– Vit vilja heita á øll, bæði kvinnur og menn, um at koma. Tað eru ongi serlig førleikakrøv sum krevjast, og tað er eitt serligt ynski um, at kvinnur skulu koma við, Operation Mobilisation í tíðindaskrivi.

Á fundinum fer Bitten Schriver frá OM at greiða frá, hvat tað inniber at vera vakt, og aftaná vera køkur og kaffi at fáa.

– Áhugað verða biðin um at senda ein teldupost til Arna Johansen á arne_johansen@yahoo.com. Um onkur kundi hugsað sær at verið vakt, men ikki kann koma leygardagin, verður tú eisini biðin um at senda ein teldupost til Arna, siga tey.

Logos Hope liggur í Kalkbrænderihavnen, Nordhavnen.

**el**




## Ársroknskapur 2003

**P/F Føroya Lívstrygging**
Postboks 206 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 351110 · www.liv.fo · skrásetingarnummar 2964

### Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld tilsamans** | **167.228.427** | **149.315.439** |
| Endurtryggingargjøld netto | -10.877.187 | -5.703.608 |
| **Tryggingargjøld netto** | **156.351.240** | **143.611.831** |
| **Inntøkur av íløguognum** | | |
| Fastogn | 705.660 | 705.660 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 70.833.342 | 65.036.070 |
| **Inntøkur av íløguogn** | **71.539.002** | **65.741.730** |
| Kursregulering virðisbrøv | 584.109 | -18.058.896 |
| **Inntøkur av íløguognum tilsamans** | **72.123.112** | **47.682.834** |
| **Tryggingarveitingar** | | |
| Útgoldnar veitingar | -73.262.743 | -47.716.803 |
| Endurtryggjarans partur | 1.125.398 | 2.614.845 |
| **Tryggingarveitingar netto** | **-72.137.345** | **-45.101.9580** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Hækking í tryggingartekniskum avsetingum brutto | -115.167.600 | -134.825.178 |
| Broyting í endurtryggjarans parti | 1.540.562 | -6.351.519 |
| **Hækking av tryggingartekniskum avsetingum netto** | **-113.627.038** | **-141.176.697** |
| **Tikið úr (+) lagt í (-) bonusútjavning** | **-15.135.290** | **20.403.454** |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi** | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -258.546 | -264.191 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -4.741.391 | -4.326.270 |
| Løn, eftirløn og ómaksløn | -8.124.419 | -7.808.097 |
| **Rakstrarútreiðslur áðrenn avskrivingar** | **-13.124.356** | **-12.398.558** |
| Avskrivingar av EDV-útgerð, innbúgv og akførum v.m. | -4.215.683 | -4.488.062 |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi** | **-17.340.039** | **-16.886.620** |
| **Útreiðslur av íløguognum** | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -2.614.389 | -4.262.020 |
| Rentuútreiðslur | -770.073 | 0 |
| Avskrivingar av fastogn og skuldarum | -137.998 | -145.772 |
| Rakstur av fastogn | -706.379 | -622.973 |
| **Útreiðslur av íløguognum tilsamans** | **-4.228.839** | **-5.030.765** |
| Fluttar íløguinntøkur (-) | -1.265.435 | -1.271.855 |
| **ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | **4.740.366** | **2.230.224** |
| Fluttar íløguinntøkur (+) | 1.265.435 | 1.271.855 |
| Aðrar vanligar útreiðslur/inntøkur | 8.135 | -78.125 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN ÓVANLIGT ER TIKIÐ VIÐ** | **6.013.936** | **3.423.954** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 98.816 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT OG AVGJØLD** | **6.013.936** | **3.522.770** |
| Skattur og avgjøld | -513.767 | -583.685 |
| **RAKSTRARÚRSLIT** | **5.500.169** | **2.939.086** |

### Fíggjarstøða

| OGN | 31.12.2003 | 31.12.2002 |
|---|---|---|
| **Íløguogn** | | |
| **Fastogn** | **14.340.111** | **13.918.591** |
| **Fíggjaríløgur** | | |
| Partabrøv | 84.354.921 | 75.943.023 |
| Lánsbrøv | 1.321.243.805 | 1.115.387.230 |
| Útlán | 36.399.863 | 23.974.911 |
| Innlán | 63.670.405 | 156.518.059 |
| **Fíggjaríløgur tilsamans** | **1.505.668.994** | **1.371.823.223** |
| **Íløguogn tilsamans** | **1.520.009.105** | **1.385.741.814** |
| **Áogn** | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum | 2.548.204 | 2.754.632 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum | 1.815.778 | 4.463.380 |
| Onnur áogn | 156.300 | 783.100 |
| **Áogn tilsamans** | **4.520.282** | **8.001.112** |
| **Onnur ogn** | | |
| Innbúgv, edv-útgerð, akfør v.m. | 7.236.884 | 9.169.122 |
| **Onnur ogn tilsamans** | **7.236.884** | **9.169.122** |
| **Tíðaravmarkingar** | | |
| Renta tilgóðar | 17.110.113 | 18.016.824 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 1.975.681 | 1.753.371 |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | **19.085.794** | **19.770.195** |
| **OGN TILSAMANS** | **1.550.852.065** | **1.422.682.240** |

| SKYLDUR | 31.12.2003 | 31.12.2002 |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| Partapeningur | 500.000 | 500.000 |
| Tiltaksgrunnur | 73.752.278 | 68.252.109 |
| **Eginogn tilsamans** | **74.252.278** | **68.752.109** |
| **Ábyrgdarpeningur** | **25.000.000** | **25.000.000** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Bruttoavsetingar | 1.402.518.366 | 1.294.922.036 |
| Endurtryggjarans partur | -4.478.487 | 0 |
| **Tryggingartekniskar avsetingar netto** | **1.398.039.879** | **1.294.922.036** |
| Tiltaksviðurgjald | 3.656.967 | 4.402.090 |
| Avsett til bonusútjavning | 29.705.847 | 14.570.557 |
| **Tryggingartekniskar avsetingar netto tilsamans** | **1.431.402.693** | **1.313.894.683** |
| **Skuld** | | |
| Frammanundangoldin tryggingargjøld | 16.922.340 | 11.349.246 |
| Onnur skuld | 3.274.755 | 3.686.202 |
| **Skuld tilsamans** | **20.197.095** | **15.035.448** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.550.852.065** | **1.422.682.240** |

REPROZ




At leggja sosiala økið út til kommunurnar:

# Nógv verri fyri borgaran



*- Tað er heilt burtur við at halda, at Føroyar við 45.000 borgarum krevja meira enn eina sosiala umsiting. Tess fleiri umsitingar, vit fáa kring landið, jú minni peningur verður eftir til tænastur til tey gomlu og veiku, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður í Sjóvar kommunu*

**- Tess fleiri umsitingar, vit fáa kring landið, jú minni peningur verður eftir til tænastur til tey gomlu og veiku. Tað er púra burturvið at halda, at neyðugt er við meira enn eini umsiting til 45.000 fólk, sigur bygdaráðsformaðurin í Sjóvar kommunu, Eivind Jacobsen. Hann sigur seg hava hampiliga gott álit á Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almannamálum, men einki álit á Jógvani við Keldu, landsstýrismanni í kommunumálum, sum hann heldur ikki er uppgávu sína vaksin**


SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Nú tríggjar kommunur í Eysturoy, Skála kommuna, Oyndarfjarðar kommuna og Elduvíkar kommuna, hava gjørt av at leggja saman við Runavíkar kommunu, hava vit spurt Eivind Jacobsen, bygdaráðsformann í Sjóvar kommunu, um ytsta kommunan á vestursíðuni á Skálafjørðinum hevur umhugsað at leggja saman við Runavíkar kommunu.

- Nei, vit hava ikki skilt, at stemningur er fyri at leggja Sjóvar kommunu saman við aðrari kommunu. Eingin tosar um samanlegging í okkara kommunu, og ongar samráðingar hava verið í so máta.

Eivind væntar tó, at soleiðis, sum gongdin er, gongur ikki long tíð, til Sjóvar kommuna við lóg verður løgd saman við hinum kommununum á Skálafjørðinum.

- Ja, tað er ikki óhugsandi, at øll Eysturoyggin verður ein kommuna, áðrenn langt um líður.

Sjálvur væntar bygdaráðsformaðurin, at landsstýrið fyribils er nøgt við gongdina, sum nú er, har fleiri kommunur í oynni sjálvbodnar hava tikið stig til samanleggingar.

- Um eini fýra ár ella so, vænti eg, at í minsta lagi Skálafjørðurin verður ein kommuna – fyri ikki at siga, at øll Eysturoyggin verður savnað í eini kommunu.

## Verri tænasta

Hann sigur, at hetta er ein avleiðing av, at sosiala økið verður lagt út til kommunurnar at umsita.

- Men eg skilji slett ikki hesa gongd og taki als ikki undir við henni, tí hetta verður eftir mínum tykki ein nógv verri loysn fyri borgaran.

Eivind rópar ætlanina at leggja sosiala økið út til kommunurnar at umsita "eina óluksáliga stóra skandalu", tí heldur enn at hava eina umsiting á sosiala økinum, skulu vit nú hava fleiri umsitingar, sum verða nógv dýrari fyri borgaran.

- Tað er heilt burtur við at halda, at Føroyar við 45.000 borgarum krevja meira enn eina sosiala umsiting. Tess fleiri umsitingar, vit fáa kring landið, jú minni peningur verður eftir til tænastur til tey gomlu og veiku.

Hann vísir á, at tá ið landið ikki megnar at umsita hetta økið og veita eina nøktandi tænastu, verður økið lagt út til kommunurnar at umsita.

## Pengar, pengar…

- Men vit skulu minnast til, at sosiala økið snýr seg um pening og bara pening. Tá ið landið ikki eigur meira pening at brúka, og kommunurnar heldur ikki hava neyðugu fíggjarligu orkuna, er ikki meira at brúka.

Eivind ásannar, at almennu Føroyar hava verið seinar á sjóvarfallinum, og haraftrat hevur ivaleyst ikki verið hildið, at neyðugt hevur verið við hægri tænastustøði enn tí, vit hava havt.

- Eg havi alla tíðina hildið, at seinasta samgongan á hesum øki hevði eina sonevnda "kreativa bókføring". Málið var at hanga sosiala økið um hálsin á kommununum, soleiðis at landskassans roknskapur fekst betur at hanga saman. Vit kunnu siga, at landsstýrið hevði brúk fyri 120 krónum, men hevði bara tær 100. Restin varð løgd yvir á kommunurnar – uttan mál og mið.

Bygdaráðsformaðurin vísir á, at sosiala økið fer at krevja nógv av kommununum, tí talan er um nógvan pening og torskildar lógir, sum skulu umsitast av serfrøðingum, um skil skal verða í.

- Eg síggi tað, sum tað reina tvætl og undanførslu at leggja sosiala økið út til 7 ella 9 ymiskar umsitingar kring landið.

Bygdaráðsformaðurin vísir á, at tær kommunur, sum eru rigast fyri fíggjarliga, hava flest gomlu at taka sær av og tær kommunurnar, sum eru best fyri fíggjarliga, siga seg ikki vilja hava útjavningarskatt.

- Í mínari verð hanga argumentini slett ikki saman, sigur hann.

## Ikki format

Eivind sigur seg hava hamiliga gott álit á Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almannamálum og væntar, at hann er maðurin, sum hugsar seg um tvær ferðir, áðrenn hann tekur sínar avgerðir. Hann heldur, at tað, sum Hans Pauli fyritekur sær á sosiala økinum, verður gjørt í góðari meining.

- Men Jógvani við Keldu, landsstýrismanni í kommunumálum, havi eg einki álit á. Eg haldi ikki, at hann hevur format at vera landsstýrismaður. So einfalt er tað, sigur bygdaráðsformaðurin í Sjóvar kommunu, Eivind Jacobsen.





*- Eg vænti, at tað, sum Hans Pauli Strøm fyritekur sær, verður gjørt í góðari meining, men Jógvani við Keldu havi eg einki álit á. Hann hevur ikki format til at vera landsstýrismaður. So einfalt er tað, heldur Eivind Jacobsen*